# Vøddamýkjan



Nýtt
Vøddamýkjan nú eisini í Svimjihøllini
Eri á skeið frá 22 okt. til og við 3. nov.
Bílegg tíð á tlf: 51 50 36 • www.hervor.fo • E-mail:hervorj@post.olivant.fo





98.000,- v/mvg



TIL SØLU
MERCEDES BENZ 412 D
160.000 km, árg 97
2 síðuhurðar og lyft
TLF. 58 40 40




# Rok í nýumvældum Kagga

**Kaggin letur upp aftan á, at hava verið afturlatin í tveir og ein hálvan mánað vegna umbygging. Hetta fyrsta vikuskiftið spælir Rok.**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í morgin fríggjadagin 13. oktober kl. 17.00 letur ein nýumvældur Kaggi upp fyri limum og viðskiftafólki annars. Øll miðhæddin og ovasta hædd eru umvældar, gólvið er skift, nýggir møblar eru keyptir, garderoba er gjørd í miðhæddini og barrin er nýbygd harumframt er eitt nýtt poolborð keypt. Soleiðis at Kaggin nú hevur tvey poolborð og eitt billiardborð á ovastu hædd.

Hetta fyrsta vikuskiftið er tað Rok í spælir, bólkurin hjá Signar í Homrum úr Kjølum og Jóhan Ziskason úr Mark no limits er ein av allar bestu og virknastu dansibólkum í landinum. Teir spæla bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið.

Hølini eru snotilig á at lýta, og hetta er sambært Rúna Falkenberg nevndarformanni eitt tiltrongt andlitslyft. Hølini hava verið nógv brúkt, og slitið sást á Kagganum. Tá Kaggin letur upp í morgin, er tað somuleiðis við einum nýggjum profili. Eyðun Samuelsen er settur sum tónleikasamskipari, og hann skal skipa fyri, at góður tónleikur altíð er at hoyra í Kagganum. Eisini er ætlanin, at venda sær til eina breiðari fjøld. Skipað verður tí fyri tiltøkum, sum venda sær til ymiskar málbólkar. Rúni sigur, at hetta er ein nýggj byrjan fyri Kaggan, og hetta er hann spentur um.

Rúni Falkenberg gleðist um, at Norðurlandahúsið valdi at brúka hølini til sýnisgluggakonsertina her fyri, og sigur at tað er stuttligt, at hølini hava fingið so nógv rós síðan konsertina. Rúni greiður frá, at Kaggin tey seinastu 10 árini hevur havt livandi tónleik, so her er talan um eitt roynt spælistað. Men hann sigur, at tað uttan iva fer at síggjast aftur, at en samskipari er settur at taka sær av tónleikinum.

Kaggin hevur verið aftur latin í tveir og ein hálvan mánað. Alt arbeiðið er gjørt av sjálvboðnum fólki, og tað er soleiðis, at hetta hevur borið til. Einasta útreiðslan hevur verið fyri tilfar, og øll umvælingin hevur kostað 150.000 kr. Rúni sigur seg gleðast serliga nógv um Barrina, hetta er ikki ein keypt barr, men ein sum hann sjálvur hevur staðið fyri at bygt. Rúni stendur ofta sjálvur í barrini, og tí hevði hann neyðugu vitanina til at gera barrina so góða at arbeiða í sum møguligt. Harumframt er hon eisini vorðin meira innbjóðandi enn tann gamla.


# Skrivstovunæmingur

Ert tú ágrýtin, virkin, fyrikomandi og hevur hægri handilsskúlaprógv? So ert tú kanska tann heilt rætti/rætta at byrja sum skrivstovunæmingur á heilsølu okkara.

Starvsøkið er í høvuðsheitum kundatænasta og telefonsøla umframt bókhald og annað skrivstovuarbeiði. Lærutíðin er 2 ár. Lønin er sambært sáttmála við S&K.

Um hetta hevur vakt tín áhuga, send eina skrivliga umsókn við møguligum váttanum/prógvum til P/f Poul Michelsen, Hoyvíksvegur 79, FO-100 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er 1. november 2005. Ætlanin er, at tú byrjar beinanvegin.

Vinarliga vend tær til Sólrún Michelsen, stjóra, ella Niels Juel Arge, fíggjarstjóra, á tlf. 314650, um tú hevur spurningar.

**P/f Poul Michelsen**

P/F Poul Michelsen ella bara PM, sum heilsølan ofta verður nevnd millum manna, varð stovnað í 1972. PM er í dag førandi heilsøla innan sítt virkisøki og hevur kundar kring alt landið. PM er skipað í 5 deildir: Søludeild, innkeyps-, fíggjar-, goymslu- og bildeild. Umleið 50 fólk starvast hjá PM.



# Skal tú hava andlitsmyndir?



Myndapakki: 8 myndir og fløga - **kr. 395,-**

Kom inn í 3-arin og hoyr nærri
ella ring 35 35 35

TEAM85

3 arin